


*Við trygga sigrinum í Sørvági, er Eysturoyinguri greiður favorittur á ólavsøku*

Mynd: Álvur Haraldsen

# eypið
# .m

Eysturoyingi. Um kappingin millum 10-mannaførini fer at enda soleiðis um sekstan dagar, so verður endastøðan 45 stig til bæði Eysturoying og Vestmenning, og so verður úrslitið á ólavsøku avgerandi.

Á Ólavsøku er róðrarteinurin stívliga 900 metrar, og tískil verða fyritreytirnar heilt øðrvísi, enn tær vóru í Sørvági. Tær fara at líkjast meiri fyritreytunum, sum tær vóru í Vestmanna, tá ið Vestmenningur vann.

Talan verður um nýggja kapping millum hesar tríggjar bátarnar, sum síðani á Vestanstevnu hava havt meiri enn tvær vikur at fyrireika seg í.

Tølini vísa, at meistarin oftast vinnur á Ólavsøku, og tað er ógvuliga sjáldan, at FM vinnarin ikki megnar í hvussu so er at enda næstfremstur.

Í 1988 vann Nólsoyingur FM. Á Ólavsøku var Nólsoyingur nummar trý. Eysturoyingur vann ta ferðina, og eisini Havnarbáturin kom fyrr á mál enn Nólsoyingur.

Síðani tá er tað komið fýra ferðir fyri, at meistarin ikki hevur vunnið á Ólavsøku, og allar ferðirnar var FM vinnarin næstfremstur. Síðsta dømið um hetta var í 2003, tá ið Nólsoyingur vann á Ólavsøku. Tá var Eysturoyingur næstfremst á Ólavsøku, og Eysturoyingur vann FM, eitt stig frammanfyri Nólsoying.

Alt bendir á, at tað er borðreitt fyri Eysturoyingi. FM steypið er komið á stokkin!

trondur@sosialurin.fo

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 09:23.24 |
| 2 | Vestmenningur | 09:29.05 |
| 3 | Hoyvíkingur | 09:30.04 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 40 |
| 2 | Vestmenningur | 38 |
| 3 | Hoyvíkingur | 30 |




*Aftur var reyði Argjabáturin fremstur, og nú er veruliga talan um eina finalu við eldi í á ólavsøku*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Reyði báturin hevur sett eld í

**8-MANNAFØR** At tað enn eina ferð eydnaðist Argjabátinum at vinna, og at Kvívíkingur aftur hesa ferð endaði á triðja plássi ber við sær, at talan verður um sanna finalu á Ólavsøku

Tróndur Arge

Argjabáturin hevur vunnið FM níggju ferð, og harvið hevur eingin vunnið hesa kappingina oftari enn argjamenn. Inntil fyri tveimum vikum síðani var tað einki, sum bendi á, at Argjabáturin fór at megna at endurvinna FM heitið frá í fjør.

Kvívíkingur vann fýra teir fyrstu róðrarnar í ár, og tá ið Frígjarin á Eystanstevnu akkurát megnaði at kíla seg inn ímillum Kvívíking og Argjabátin, sum annars hevði verið næstfremstur, so tóktist gullið at bíða eftir kvívíkingum.

Tey bæði seinastu vikuskiftini er tað púra vent upp og niður í hesi kappingini. Eitt er, at Argjabáturin so dyggiliga hevur svarað aftur við at vinna lutfalsliga sannførandi sigrar, og eitt annað er tað, at Kvívíkingur ikki bara hevur mist fremsta plássið, men eisini er dottin aftur á triðja plássið – bæði í Vestmanna og nú í Sørvági.

Støðan nú er soleiðis, at tað er lagt upp til finalu á Ólavsøku. Kvívíkingur er eitt stig frammanfyri Argjabátin. Tað vil siga, at um Argjabáturin verður eitt pláss frammanfyri Kvívíking í síðsta róðrinum, so fer at standa á jøvnum í stigum, og so verður úrslitið á Ólavsøku avgerandi.

Um mett verður út frá gongdini higartil, so er einki forgjørt í at meta, at Argjabáturin nú er favorittur at vinna FM fyri tíggjundu ferð. Men nú fæst at síggja. Felags fyri Argjabátin, Kvívíking og hinar bátarnar er, at teir nú hava meiri enn tvær vikur at fyrireika seg í. Eisini Friggjarin, sum hevur góðan møguleika at vinna á Ólavsøku og harvið at bjarga árinum, ið annars ikki heilt hevur hilnast soleiðis, sum miðvingar høvdu ætlað tað.

Friggjarin var leingi fremstur í Sørvági, og tað sá út til, at Friggjarin ætlaði sær at vinna. Men tað vildu argjamenn ikki. Argjabáturin legði seg á odda, og Argjabáturin var ein lítlan hálvan skut frammanfyri Friggjaran, sum vann við einum skuti á Kvívíkingi.

Aftur hesa ferð var Árnfirðingur leingi við, men enn eina ferð datt Árnfirðingur aftur av, og kom á mál meiri enn eina bátslongd aftanfyri Kvívíking. Knørrur vann innanhýsis kappingina í høvuðsstaðnum við Ørv um at sleppa undan aftasta plássinum.

trondur@sosialurin.fo

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 07:06.20 |
| 2 | Friggjarin | 07:07.08 |
| 3 | Kvívíkingur | 07:08.00 |
| 4 | Árnfirðingur | 07:12.23 |
| 5 | Knørrur | 07:24.19 |
| 6 | Ørvur | 07:30.09 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kvívíkingur | 38 |
| 2 | Argjabáturin | 37 |
| 3 | Friggjarin | 31 |
| 4 | Árnfirðingur | 26 |
| 5 | Knørrur | 15 |
| 6 | Ørvur | 15 |